UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 3. mai 2022
J.nr.: 22/05605-1

# Reglugerð
# fyri
# játtan til verkætlanir innan framburð og menning á landbúnaðarøkinum

## Endamál

**§ 1.** Reglugerðin ásetur treytir fyri nýtslu av játtan á konto 6.33.2.01. Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving, undirkonta 21. Verkætlanir.

*Stk. 2.* Játtanin er ætlað til stuðul til verkætlanir, sum á nýskapandi hátt menna landbúnað og landbúnaðarframleiðslu í Føroyum. Yvirskipað skulu verkætlanirnar vísa á veruligar møguleikar fyri menning og vøkstri í landbúnaðinum.

Í høvuðsheitum skal talan vera um kanningar, verkligar royndir ella verkætlanir, sum vísa nýggjar leiðir ella sum leggja nýggja og viðkomandi vitan aftur at verandi framleiðsluhættum, mannagongdum o.ø.

Royndirnar skulu gerast í samstarvi við Búnaðarstovuna, sum skal tryggja, at úrslitini gerast atkomulig hjá almenninginum og tøk hjá øðrum at brúka.

*Stk. 3.* Játtanin kann eitt nú verða nýtt til kanningar, skjalfesting og til praktiskar royndir.

## Umsiting

**§ 2.** Búnaðarstovan umsitur játtanina og ger avtalur um samstarv við eksternar luttakarar. Búnaðarstovan tryggjar, at verkætlanin er í samsvari við hesa reglugerð og árligu løgtingsfíggjarlógina konta 6.33.2.01.21.

*Stk. 2.* Verkætlanir, har bert Búnaðarstovan luttekur, skulu góðkennast av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

## Treytir

**§ 3.** Búnaðarstovan kann fremja verkætlanir saman við bøndum, felagsskapum o.ø.

*Stk. 2.* Búnaðarstovan ger saman við luttakandi pørtunum eina skrivliga samstarvsavtalu, sum skal fevna um:

a. lýsing av verkætlanini og væntaða úrslitinum,
b. greining av samsvarinum millum endamálið við verkætlanini og endamálið við játtanini,
c. lýsing av luttakarunum og
d. arbeiðs-, tíðar- og kostnaðarætlan fyri verkætlanina

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN • TELEFON 30 66 00 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

*Stk. 3.* Búnaðarstovan ger saman við luttakandi pørtunum eina frágreiðing um verkætlanina. Búnaðarstovan ásetur í játtanarskrivinum í hvørjum líki, frágreiðingin skal latast og nær.

**Umsókn**

**§ 4.** Umsóknir skulu latast Búnaðarstovuni. Lýst verður eftir verkætlanum á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni, www.bst.fo. Freistin er tríggjar vikur.

*Stk. 2.* Umboð fyri Búnaðarstovuna og Umhvørvis- og vinnumálaráðið viðgera innkomnu umsóknirnar.

**Útgjald**

**§ 4.** Játtanin til verkætlanina verður útgoldin, tá Búnaðarstovan hevur gjørt ella móttikið verkætlanarroknskap.

*Stk. 2.* Útgjald kann eisini verða goldið fyri ávegis verkætlanarroknskapir.

*Stk. 2.* Verkætlanarroknskapurin skal lúka treytirnar í §§ 21-22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

**Gildiskoma**

**§ 5.** Henda reglugerð kemur í gildi beinanvegin.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 3. mai 2022

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður

/Herálvur Joensen
aðalstjóri